inni - trygt og ómaksleyst til hús



## Sethús – Traðagøta 14, Argir

Húsini eru í 2 hæddum - ovara hædd á 130 fermetrar og kjallari á 50 fermetrar - í alt um 180 fermetrar. Grundøkið er 455 fermetrar. Byggiár: 1952 / 2003. Tak og tætt tróður er frá 1989, og annars eru nýggjar innleggingar so sum el, hiti, vatn, kloakk, rottangi, ketil, oljufýr og skorsteinur frá 2003, eins og vindeyguni og øll miðhæddin er gjørd av nýggjum. Í erva er vaskirúm / bryggers, inngongd, gongd, baðirúm, køkur / borðstova / alrúm, stova og 4 kømur. Í neðra er fýrrúm / kjallararúm. Húsini liggja í friðarligum og veðurgóðum umhvørvi nær við skúla, barnagarð, handil og bátahavn. Har er gott busssamband og sera gott útsýni. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.



## Samanbygd sethús/summarhús – við Gjónna 7, Gjógv

Húsini eru í 2 hæddum og lágum kjallara, samlað búvídd 56 fermetrar. Hartil er ein síðubygningur í 2 hæddum á 30 fermetrar í alt 60. Grundøkið er 238 fermetrar. Byggiár uml. 1900. Í ovastu hædd er gongd og 2 kømur. Í miðhæddini er gongd, køkur, stova, baðirúm og vaskirúm. Í niðastu hædd er kjallararúm. Hartil er ein hjallur. Urtagarður er niðanfyri húsini. Húsini standa í barnarvinarligum og friðarligum umhvørvi. Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.



## Stásilig sethús – Blankagøta 14, Tórshavn

Húsini, ið eru í serflokki til dygd og stand, eru í 2 hæddum, hvør á 133 fermetrar - í alt 266 fermetrar alt innrættað - og garaga / hjallur á 32 fermetrar. Í neðra er nýgjørd sjálvstøðug íbúð. Grundøkið er 530 fermetrar. Byggiár: 1986 / 2005. Húsini eru væl bygd, væl viðlíkahildin og í sera góðum standi. Í ovaru hædd er inngongd, stórur durur, hall, hjúnarrúm við egnum baðirúmi, stór borðsstova, hugnastova við brenniovni, køkur / alrúm, bryggers við egnari inngongd, baðirúm og 2 kømur. Í niðaru hædd er inngongd, gongd, baðirúm, fýrrúm, køkur, stova, millumgongd, 2 stór kømur, trappugongd og 2 stór goymslurúm. Til ognina er stór garaga við hjalli í endanum. Hartil er stoyptur garður / urtagarður runt húsini. Húsini standa frítt fyri í náttúruvøkrum umhvørvi við góðum útsýni 5 min. við bili frá miðbýnum beint við busssteðgipláss og barnagarð. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.



## Sethús – Gerðisvegur 11, Hvalvík

Húsini eru í tveimun hæddum - íalt uml. 160 kvadratmetrar. Grundøkið er 671 fermetrar. Byggiár: 2004. Húsini hava bæði trimpil og kvist, sum ger loftshæddina sera rúmliga. Alt handverk í húsunum er serstakliga væl gjørt. Í niðaru hædd er gongd, køkur, stova, vaski- / fýrrúm og goymslurúm. Í ovaru hædd er loftsstova, 3 kømur, hjúnarrúm og baðirúm við brúsu og baðikari. Húsini eru konstrueruð eftir norskum Systemhússtandardi. Hesi krøv áseta sera góða bjálving, og úrslitið er eitt árligt oljuforbrúk á einans uml. 850 litrar. Húsini eru úr timbri, hava alminiumstak og plastvindeygu. Húsini standa á stoyptum sokli, sum er væl bjálvaður bæði niðureftir og í síðunum. Á stykkinum eru veggir til garagu stoyptir. Húsini, sum standa í barnavinarligum umhvørvi, hava gott útsýni. Stutt er til barnagarð, vøggustovu, frítíðarskúla og skúla. Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.



## Sethús – Norður í Gerði 20, Fuglafjørður

Húsini eru í 3 hæddum - samlað búvídd uml 200 fermetrar. Grundøkið er 128 fermetrar. Byggiár: 1960. Í ovastu hædd er gongd, baðirúm, stórt hjúnarrúm og 3 kømur. Í miðhæddini er gongd, baðirúm, køkur og stova. Í niðastu hædd er vaski- / fýr- / kjallararúm umframt eitt goymslurúm er undir bilplattinum. Ymiskar umvalingar eru gjørdar: Millum annað er tak, vindeygu og ketil skift/ur. Garður er runt húsini. Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.



## Sethús – Toftavegur 16, Toftir

Húsini eru í 2 hæddum - samlað búvíðð uml. 176 fermetrar. Grundøkið er uml 450 fermetrar. Byggiar: 1950'ini. Í erva er durur, vaskirúm, turkihjallur, hjallur, køkur, wc, goymslurúm, stova, kamar og baðirúm. Í neðra er kjallararúm- / fýrrúm og goymslurúm. Húsini standa niðanfyri høvuðsvegin beint við skúla, handil og kajøki. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.



## Jørð – Norðuri í Sundum, Kollafjørður

Ognin er eitt stórt jarðarstykki / trøð innangarðs á uml. 10.520 fermetrar. Ognin, ið er væl egnað til grundstykki, liggur sera væl fyri í náttúruvøkrum og friðarligum umhvørvi við sera góðum útsýni og atgongd til veg. Ognin verður seld, um hóskandi boð fæst.



## Sethús – Heiðatún 3, Argir

Húsini eru í 2 hæddum, hvør á 125 fermetrar - í alt 250 fermetrar búøki. Grundøkið er 504 fermetrar. Byggiár: 1982. Í neðra er inngongd, durur, hall, wc, vaskirúm / ítrivsrúm við egnari inngongd, kamar og stórt fýrrúm / goymslurúm. Í erva er repos / hall við útgongd til terassu / urtagarð við sera góðum sólargangi, stova, matarkøkur, strúkirúm / kovi, baðirúm (kar og brús) og 3 kømur. Húsini standa í veðurgóðum, náttúruvøkrum og friðarligum umhvørvi við blindan veg, og garður / urtagarður er uttan um húsini. Útsýnið er sera gott (panorama) inn yvir Havnina og út á fjørðin, gøta er niðan á Hamaran og stutt er til skúla og barnagarð, bussleið og smábátahavn. Prísuppskot: kr. 2.500.000,00.



## Raðhús – Yviri við Strond 41, Tórshavn

Húsini eru í 3 hæddum - hvør á 43,5 fermetrar - í alt uml. 130 fermetrar. Grundøkið er 109 fermetrar. Byggiár: 1965. Í miðhæddini er inngongd, gongd, køkur og stova. Í ovastu hædd er trappugongd, baðirúm, hjúnarrúm og 2 kømur. Í niðastu hædd er trappa og egin inngongd, vaskirúm / fýrrúm og kjallararúm, ið er gjørt klárt til at innrætta. Húsini standa nær miðbýnum í náttúruvøkrum umhvørvi við sera góðum útsýni. Har er gott grannalag, stutt til skúla og barnagarð og beint við busssamband. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.



## Raðhús – Maritugøta 17, Hoyvík

Húsini eru í 2 hæddum - hvør á 59 fermetrar - í alt 118 fermetrar. Grundøkið er 136 fermetrar. Byggiár: 2003. Í neðra er inngongd, gongd, vaskirúm / wc, goymslurúm, køkur / alrúm / borðstova / stova við útgongd til terassu. Í erva er trappugongd, hjúnarrúm, baðirúm og 2 kømur. Harafturat er hjallur / goymslurúm við innløgdum vatni. Húsini hava felags antennuskipan, talevarp og hartil egna parabol. Eigararnir hava atgongd til býlingshús, har er virkið eigarafelag og gott grannalag. Húsini standa í náttúruvøkrum og barnavinaligum umhvørvi við góðum sólargangi og góðum útsýni. Prísuppskot: kr. 2.200.000,00.



## Sethús – Magnus Heinassonargøta 17, Tórshavn

Húsini eru í 4 hæddum, 3 hæddir á uml. 50 fermetrar og ovasta hædd heldur minni - í alt uml. 180 fermetrar gólvvídd. Grundøkið er 99 fermetrar. Byggiár upprunaliga uml. 1910, men klædningur, nøkur vindeygu og tak er rættiliga nýtt. Í miðhæddini er inngongd, gongd, køkur, borðstova og stova. Í ovaru hædd er trappugongd, baðirúm, køkur og stova. Í ovastu hædd er trappugongd, baðirúm og 2 kømur. Í niðastu hædd er vaski- / fýr- / kjallararúm. Húsini standa sera væl fyri við handilsgøtu í miðbýarøkinum mitt í Havnini. Prísuppskot: kr. 2.300.000,00.



## Stór sethús – Ósabakkavegur 2, Kollafjørður

Húsini eru í 2 hæddum 186 fermetrar hvør - í alt 372 umframt eitt óinrættað loft. Grundøki er uml 1485 fermetrar. Byggiár: upprunaliga 1950-60'unum, uppíbygd í 1980'unum. Húsini eru høvuðsumvæld innan í 2006 har køkur, hvítvørur, øll gólv, innveggir, loft og nøkur vindeygu eru skift. Eisini er ein partur av takinum er skift. Húsini eru nýmálað innan og uttan. Í erva er durur, 2 gongir, køkur, stova, 2 baðirúm og 4 kømur. Í neðra er sjálvstøðug íbúð. Har er durur, gongd, køkur, stova, kamar, baðirúm, fýr- / vaskirúm, kjallararúm og 2 goymslurúm. Harafturat er bilhús við lofti á uml. 55 fermetrar. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.

## Trøð í Oyndafirði til sølu

Dyrkað trøð á umleið 10.000 fermetrar til víddar við ástandandi hoyggj- og seyðahúsið. Liggur væl fyri áðrenn komið verður til bygdina.
Trøðin verður seld um hóskandi boð fæst

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 35 42 00 • Fax 35 42 01

inni

Sosialurin 341800